


## Veiðivirðið vaks

Ein uppgerð yvir ellivu teir fyrstu mánaðarnar í fjør vísir, at stórar broytingar vóru í veiðivirðinum hjá íslendingum í 2006. Tann største broytingin var í lodnuni, tí har minkaði virðivirðið heili 54 prosent. Harafturímóti vaks veiðivirðið á botnfiskinum nógv. Toskavirðið vaks góð 9 prosent, hýsan 28 prosent, og veiðivirðið á upsa vaks heili 59 prosent. Tilsamamans fiskaðu íslendingar fyri 70,5 mia. íslendskar krónur frá januar til november.

*mynd: Morgunblaðið*

## Nógv bygging

Tað er ikki bara í Føroyum, at byggivinnan hevur úr at gera. Í Danmark hevur byggivirksemið ongantíð verið so stórt sum nú. Tað hevur gjørt, at stórur tørvur er á arbeiðsmegi innan byggivinnuna, og feløgini noyðast av landinum eftir fólki. Felagið hjá donskum byggifyritøkum hevur roknað seg fram til, at í ár verður bygt fyri 215 mia. krónur. Men trøini veksa ikki inn í Himmalin, og felagið væntar, at í 2008 fer virksemið at minka aftur.

# Elva fann fløskupost úr Kvívík

**Tað er langur vegur úr Kvívík til Djúpavog í Íslandi. Trý ár tók tað hjá einum fløskuposti at fara hesa longu leiðina**

BØRN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Kvívík:** Ein summardag í 2004 høvdu teir yngstu næmingarnir í Kvívíkar skúla sett sær eitt fyri.

Tey høvdu skrivað tekstin til ein fløskupost, og týsdagin 15. juni var dagurin komin at fløskan skuldi tveitast á sjógv.

Saman við lærara teirra høvdu tey lagt eitt bræv í fløskuna, sum greiddi frá hvaðani hann varð sendur og hvat finnarin skuldi gera við hann.

Leingi gingu tey spent og bíðaðu eftir at okkurt skuldi hoyrast aftur frá honum. Onkur kanska misti vónina um at hann nakrantíð fór at koma aftur í aftur.

Men næstseinasta fríggjadag komu boð úr Íslandi, at tann 44 ára gamla Elva Sigurðardóttir í Djúpavogi hevði funnið fløskupostin.

Sama dag sendi hon bræv til skúlan í Kvívík um fundin. Við brævinum lá góðgæti til allar næmingarnar.




*Tey sendu og fingu svar úr Íslandi: Aftast vinstrumegin: Monika, Elsubeth, Kristina, Johan, Poul Martin, Jóhan Kári og Tróndur. Fremst vinstrumegin: Niklas, Eyðun og John Asbjørn*

*Mynd: Jens Kr. Vanga*

### Bræv og góðgæti

Tað vóru 1. og 2. flokkur í Kvívíkar skúla sum tveittu henda fløskupostin út í heimbygdini henda junidagin í 2004.

Í fløskuni høvdu tey lagt eitt bræv, har tey við fáum orðum greiddu frá heimbygdini.

- Tað hevði verið stuttligt at frætt frá tykkum sum finna henda fløskupostin, skrivaðu næmingarnir tá.

Tey heittu á finnaran um at siga nøkur fá orð um hvat tey búðu og hvar tey funnu hann. Og tað gjørdi Elva í Djúpavogi so sanniliga.

Hon skrivar í brævinum, at hon er ein 44 ára gomul húsmóðir, sum hevur mann og trý børn. Í bygdini búgva um 400 fólk.

Tað serstaka við Elvu er, at hon hevur verið ikki færri enn tríggjar ferðir í Føroyum, tí hon hevur familju her. Talan er um Andreasenættina á Norðskála.

- Tað var stuttligt at finna henda fløskupostin. Eg sendi tykkum nakað av góðgæti við.

- Má tað ganga tykkum væl í framtíðini, endar Elva Sigurðardóttir brævið.

Óhugsandi er ikki, at Elva møguliga fer at vitja í Kvívík næstu ferð hon kemur til Føroyar.




*Fløskuposturin hevði trý ár at koma úr Kvívík allan vegin til Djúpavog á suðureysturlandi Íslands*

# Nú er klárt at grava út

**Í góðveðrinum seinnapartin leygardagin var fyrsti bøkkurin loystur í ætlanini at útvega árnfirðingum nýtt bygdarhús**

BYGDARHÚS
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Árnafjørður:** Tað var borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen sum setti spakan í jørðina, har bygdarhúsið kemur at liggja.

Bygdarfelagið Báran hevur arbeitt við hesum málinum í mong ár, og nú er fyrsta stigið tikið til bygdarhúsið, sum farið verður undir í næstum.

Tvey feløg hava latið tilboð inn til útgrevsturin, og er ætlanin at arbeiðið skal byrja um ein til tveir mánaðir.

Eingin tíðarfreist er kortini sett fyri nær arbeiðið skal verða liðugt. Men lítil ivi er um, at tað er eitt ótrúligt tak hjá einum felagi við einans 60 limum at útvega sær felagshús.

Í samrøðu við Sosialin í farnu viku segði formaðurin í Báruni, Atli Justinussen at bygdarhúsið fer at kosta um 8 mió krónur. Av hesum er ein góð helvt stuðul, meðan felagið sjálvt útvegar 2 mió og tekur restina í láni.




*Steinbjørn O. Jacobsen nýtti ikki stóra gravimaskinu at loysa fyrsta bøkkin til bygdarhúsið í Árnafirði. Hóast hetta, er tað ein stór ætlan fyri eitt lítið felag, sum nú stendur fyri framman*

*Mynd: Høgni Thomsen*